# Løgmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 07.07.2023 |
| Mál nr.: | 23/02096-12 |
| Málsviðgjørt: | EM |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru (foreldramyndugleikalógin)**
(Samverusjikana, ferðing í sambandi við samveru, ókeypis advokatumboðan og aðrar broytingar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 16. mai 2022 um foreldramyndugleika og samveru (foreldramyndugleikalógin), verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 20, stk. 3-5 verður orðað soleiðis:
*"Stk. 3.* Familjufyrisitingin kann eftir umbøn taka avgerð um vavið og útinnan av samveru og kann áseta neyðugar treytir í tí sambandi, undir hesum um at varðveita passið hjá barninum og at tryggja, at samveruforeldrið ikki er ávirkað, meðan samvera er.
*Stk. 4.* Bæði samveruforeldrið og bústaðarforeldrið kunnu søkja um at fáa samveru ásetta. Familjufyrisitingin kann tó bara áseta samveru, um samveruforeldrið vil hava samveru.
*Stk.* 5. Familjufyrisitingin kann nokta at áseta samveru ella seta eina avtalu ella avgerð um samveru úr gildi."

**2.** § 21 verður orðað soleiðis:
"**§ 21.** Ásett ella avtalað samvera dettur bara burtur, tá ið foreldrini hava avtalað tað, ella tá ið Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um tað sbrt. §§ 20, 22 og 38 a ella tá ið rætturin hevur tikið avgerð um tað sbrt. § 593 í retsplejelov for Færøerne."

**3.** Í § 23 verður sum stk. 2 sett:
"S*tk. 2.* Samvera er treytað av, at barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við viðkomandi, sum søkir um at fáa samveru ásetta."

**4.** Yvirskriftin yvir § 29 verður orðað soleiðis:

“*Ferðing í sambandi við samveru”.*

**5.** § 29 verður orðað soleiðis:
“**§ 29.** Foreldrini hava felags ábyrgd av at leggja ferðing í sambandi við samveru til rættis.
*Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann í heilt serligum førum og eftir umbøn taka avgerð um, hvussu ábyrgdin av ferðingini í sambandi við samveru skal býtast millum foreldrini.
*Stk. 3.* Verður samvera ásett við onnur enn foreldur, hevur viðkomandi ábyrgd av ferðingini í hesum sambandi.”

**6.** § 32, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.

**7.** Sum yvirskrift yvir § 39 verður sett:
“*Sjónarmiðini hjá barninum”.*

**8.** Sum yvirskrift yvir § 43 verður sett:
“*Fíggjarligar upplýsingar”.*

**9.** Sum yvirskrift yvir § 44 verður sett:
“*Broyting og avvísan av umbøn um broyting”.*

**10.** § 45, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 1.* Foreldur, ið eru partur í einum máli um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 hava rætt til ókeypis advokatumboðan.”

**11.** Í § 45 verður aftaná stk. 1 sum nýtt stk. sett:
*“Stk. 2.* Rætturin til ókeypis advokatumboðan fevnir eisini um samverumál, um samverumálið verður viðgjørt saman við málinum um bústaðin hjá barninum, sbr. § 38, stk. 2.”
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

**12.** Í § 47, nr. 5 verður “ferðaútreiðslur” broytt til “ferðing”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Nýggja lógin um foreldramyndugleika og samveru varð sett í gildi 1. januar 2023.

Síðani nýggja lógin varð sett í gildi, hevur tað víst seg, at tørvur er á at nágreina nakrar ásetingar, eins og tøvur er á nýggjum ásetingum.

Tørvur er á nýggjari áseting fyri at forða fyri sonevndari samverusjikanu, eins og tørvur er á at nágreina ásetingarnar um samveru, ferðing í sambandi við samveru, um heimildina hjá rættinum at taka fyribils avgerð um bústaðin hjá barninum og um ókeypis advokatumboðan í málum um samveru og bústað, sum eru til viðgerðar í Familjufyrisitingini.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Reglur um foreldramyndugleika og samveru eru ásettar í løgtingslóg nr. 87 frá 16. mai 2022 um foreldramyndugleika og samveru, sum varð sett í gildi 1. januar 2023.

***Viðbótarsamvera og samverusjikana***

Í § 24, stk. 1 er ásett, at samveruforeldrið hevur rætt til sjálvvirkandi viðbótarsamveru fyri mista samveru, um bústaðarforeldur hevur forðað samveru uttan haldgóða orsøk. Tað er ein treyt fyri at fáa viðbótarsamveru, at samveruforeldrið beinanvegin eftir, at samveran ikki verður hildin, gevur bústaðarforeldrinum boð um, at viðkomandi vil hava viðbótarsamveru. Viðbótarsamvera er somuleiðis treytað av, at tað ikki er orsakað av viðurskiftum hjá samveruforeldrinum, at samvera ikki verður hildin.

Endamálið við ásetingin er at varðveita sambandið millum barnið og samveruforeldrið og at forða fyri, at bústaðarforeldrið avlýsir avtalaða samveru. Samveruforeldrið hevur rætt til viðbótarsamveru uttan mun til orsøkina til, at samveran verður avlýst, eisini um barnið verður sjúkt. Ásetingin um viðbótarsamveru er galdandi, tá ið foreldrini sjálvi hava gjørt avtalu um samveru, og tá ið Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um at áseta samveru. Ásetingin hevur tó bara praktiskan týdning í støðum, tá ið foreldrini ikki sjálvi kunnu avtala broytingar í samveru. Foreldrini kunnu sjálvi avtala broytingar um samveru eftir tørvi.

Um samveruforeldrið vil hava viðbótarsamveru, skal viðkomandi sjálvt boða bústaðarforeldrinum frá hesum beinanvegin eftir, at samveran ikki verður hildin. Samveruforeldrið skal sostatt ikki søkja um viðbótarsamveru hjá Familjufyrisitingini.

Familjufyrisitingin kann ikki hjálpa við at fremja viðbótarsamveru. Um viðbótarsamvera ikki verður hildin, og um samveruforeldrið vil hava viðbótarsamveru, skal samveruforeldrið venda sær til rættin.

Verður viðbótarsamvera ásett, verður hon ásett vikuna eftir undir somu treytum, sum samvera annars varð avtalað ella ásett. Um hetta merkir, at viðbótarsamvera heilt ella partvíst skuldi verið í feriu ella halgidøgum, har barnið sambært samveruavtaluni ella -avgerðini skuldi vera hjá bústaðarforeldrinum, dettur viðbótarsamvera burtur.

Sambært stk. 2 og 3 hevur samveruforeldrið bara rætt til viðbótarsamveru í sambandi við støðuga samveru og ikki í einstøkum samveruavtalum, so sum samveru í feriu og halgidøgum ella samveru undir eftirliti.

Hetta merkir, at samveruforeldrið ikki fær viðbótarsamveru, um t.d. feriusamvera ikki verður hildin. Um barnið ikki verður handað til t.d. feriusamveru, má samveruforeldrið sostatt venda sær til fútarættin fyri at fáa samveru. Hetta tí, at samvera er lagað til serligar umstøður, og tí at tað illa ber til at seta samveru í staðin fyri feriusamveru á sama hátt sum við leypandi samveru.

Tað sama er galdandi fyri samveru undir eftirliti og samveru, sum liggur ávís tíðarskeið uttan fyri vanligu og leypandi samveruna, t.d. orsakað av skeivum arbeiðstíðum hjá samveruforeldrinum. Heldur ikki í hesum førum ber til at áseta samveru í staðin fyri samveruna, sum ikki var hildin eins og um talan var um leypandi samveru.

Tað kunnu sostatt vera fleiri støður, sum forða fyri, at barnið hevur samveru við samveruforeldrið. Bústaðarforeldrið kann t.d. leggja sína feriu saman við barninum soleiðis til rættis, at hetta gongur út yvir feriusamveru, sum annars longu er avtalað ella ásett.

Hetta er at meta sum samverusjikana.

Soleiðis sum lógin nú er orðað merkir hetta, at samveruforeldrið ikki kann fáa viðbótarsamveru í førum við samverusjikanu. Reglurnar um viðbótarsamveru fevna ikki um samverusjikanu, og Familjufyrisitingin hevur onga heimild til at taka avgerð um viðbótarsamveru, tá talan er um samverusjikanu ella til at regulera viðurskiftini hjá bústaðarfoeldrinum.

***Ferðing og ferðaútreiðslur***

Í § 29 í lógini er ásett, at ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru innanlands og uttanlands sum meginregla skulu býtast millum foreldrini.

Víðari er ásett í stk. 2, at Familjufyrisitingin í heilt serligum føri kann taka avgerð um býtið av ferðaútreiðslunum í sambandi við samveru uttanlands, um foreldur er ósamd um hetta.

Orðingin “sum meginregla” í § 29, stk. 1, er villeiðandi, tí eingin heimild er at veita undantak fyri býtinum í sambandi við samveru innanlands, eins og tað er í sambandi við samveru uttanlands.

Soleiðis sum lógin er orðað, verður lagt upp til, at foreldur venda sær til Familjufyrisitingina fyri at fáa eina avgerð um ferðing og ferðaútreiðslur.

Tá ið lógin varð skrivað, var ætlanin ikki at víkja frá donsku reglunum um ferðing í sambandi við samveru. Tað hevur sostatt helst ikki verið ætlanin, at leggja upp til, at Familjufyrisitingin skal fara í smálutir í samverumálum og taka avgerðir um ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru.

Hetta er óheppið og elvir til nógva málsviðgerð. Hetta kann eisini elva til fleiri ósemjur millum foreldrini og kann tí vera við til at draga málsviðgerðina enn longur út.

### *Heimild at taka avgerð um bústaðin hjá barninum*

Sambært gomlu foreldramyndugleikalógini var eingin heimild at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Spurningurin um bústaðin hjá barninum var ein partur av foreldramyndugleikamálinum, og ósemjur um hetta vóru viðgjørdar og avgjørdar í rættinum.

Sambært nýggju lógini ber til at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Tað er Familjufyrisitingin sum hevur fingið hesa heimild. Í lógini er tó ásett, at rætturin kann taka fyribils avgerð um bústaðin hjá barninum.

Hóast hetta er ásett í lógini, ber hetta í løtuni ikki til, tí eingin heimild er til tað í rættargangslógin.

### *Ókeypis advokatumboðan*

Sambært § 45 hava foreldur, ið eru partar í málinum um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 og um samveru sbrt. § 20 og 21, rætt til ókeypis umboðan í málum til viðgerðar í Familjufyrisitingini.

Hædd er tó ikki tikin fyri fíggjarligu avleiðingunum av at veita ókeypis umboðan bæði í samverumálum og málum um bústaðin hjá barninum. Í lógaruppskotinum er støði bara tikið í málum um bústaðin hjá barninum, og víst verður á, at í 2020 vóru 12 mál løgd fyri rættin um foreldramyndugleika og í 2021 var talan um 6 mál. Við støði í hesum tølum verður mett, at 12 mál verða viðgjørd í Familjufyrisitingini árliga um bústaðin hjá barninum.

Einki verður nevnt um samverumál í hesum sambandi. Heldur einki verður nevnt um, at arbeiðsbyrðan í Familjufyrisitingini verður økt munandi.

Familjufyrisitingin hevur upplýst, at í 2020 fekk Familjufyrisitingin 132 umsóknir um samveru, harav 70 umsóknir endaðu við avtalu millum foreldrini. Í 2021 fekk Familjufyrisitingin 100 umsóknir um samveru, harav 51 endaðu við avtalu.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fáa til vega heimild til Familjufyrisitingina at taka avgerð um, nær avtalað ella ásett samvera dettur burtur. Samstundis verður rætturin hjá bústaðarforeldrinum til frítt at leggja feriu saman við barninum avmarkaður. Um frítíðin fellur saman við longu ásettari ella avtalaðari samveru, má bústaðarforeldrið søkja um, at samveran dettur burtur. Endamálið er at forða fyri samverusjikanu.

Ásetingarnar um samveru verða somuleiðis samanskrivaðar og nágreinaðar. Í lógini er ásett, at Familjufyrisitingini tekur avgerð um vavið og útinnan av samveru og kann áseta neyðugar treytir í tí sambandi. Við uppskotinum verður nágreinað, hvørjar treytir kunnu ásetast, eitt nú treytir um at varðveita passið hjá barninum og at tryggja, at samveruforeldrið ikki er ávirkað, meðan samvera er.

Eisini verður ásett, at samvera millum eitt ættleitt barn og uppruna skyldfólk er treytað av, at barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við viðkomandi, sum søkir um at fáa samveru ásetta.

Endamálið er somuleiðis at broyta orðingina í § 29 um ferðing og ferðaútreiðslur, soleiðis at Familjufyrisitingin ikki skal taka avgerð um smálutir í sambandi við samveru.

Heimildin hjá rættinum at taka fyrisbils avgerð um bústaðin hjá barninum verður strikað, av tí at tí eingin heimild er til hetta í rættargangslógin.

Rætturin til ókeypis advokatumboðan verður avmarkaður til sum meginregla bara at fevna um mál um bústaðin hjá barninum. Rætturin til ókeypis umboðan fer tó eisini at fevna um samverumálum, um samverumálið verður viðgjørt saman við málinum um bústaðin hjá barninum, sbr. § 38, stk. 2.

Nú høvi býst verða aðrar broytingar eisini gjørdar við tí fyri eygað at skapa betri yvirlit í lógini, og tí verða yvirskriftir settar yvir nakrar ásetingar.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

***Samvera***

Reglur um samveru eru ásettar í §§ 20-24.

Í § 21 er ásett, at Familjufyrisitingin eftir umbøn kann taka avgerð um vavið og útinnan av samveru og kann áseta neyðugar treytir í tí sambandi. Við uppskotinum verður nágreinað, hvørjar treytir kunnu ásetast, eitt nú treytir um at varðveita passið hjá barninum og at tryggja, at samveruforeldrið ikki er ávirkað, meðan samvera er.

Talan er um longu galdandi praksis, sum nú verður ásett beinleiðis í lógini.

Ásetingarnar um samveru verða somuleiðis samanskrivaðar og nágreinaðar.

Sambært galdandi lóg kann Familjufyrisitingin áseta samveru millum eitt ættleitt barn og uppruna skyldfólk. Við uppskotinum verður ásett, at samvera millum eitt ættleitt barn og uppruna skyldfólk er treytað av, at barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við viðkomandi, sum søkir um at fáa samveru ásetta.

***Viðbótarsamvera og samverusjikana***

Fyri at tryggja, at barnið er saman við samveruforeldrinum, tá ið samvera er avtalað ella ásett, og fyri at barnið leypandi hevur samband við samveruforeldrið, verður skotið upp, at ásett ella avtala samvera bara dettur burtur, tá ið foreldrini hava avtalað tað, ella tá ið Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um tað.

Endamálið er at tryggja leypandi samveru og at forða fyri samverusjikanu frá bústaðarforeldrinum.

Sambært galdandi lóg kann bústaðarforeldrið frítt leggja sína feriu saman við barninum. Hendan meginreglan inniber, at bústaðarforeldrið í dag hevur møguleika fyri at leggja sína feriu soleiðis til rættis, at hetta gongur út yvir feriusamveru við samveruforeldrinum, sum annars longu er avtalað ella ásett.

Hetta er at meta sum samverusjikana, og slíkar støður eru ikki fevndar av reglunum um vðbótarsamveru.

Soleiðis sum lógin nú er orðað kann samveruforeldrið ikki fáa viðbótarsamveru í førum við samverusjikanu, tí Familjufyrisitingin ikki hevur nakra heimild til at taka avgerð um viðbótarsamveru, tá talan er um samverusjikanu.

Við uppskotinum verður rætturin hjá bústaðarforeldrinum til frítt at leggja feriu saman við barninum avmarkaður. Um bústaðarforeldrið vil halda frí við barninum samstundis, sum samvera longu er avtalað ella ásett, og foreldrini ikki eru samd um hetta, skal bústaðarforeldrið sostatt venda sær til Familjufyrisitingina og søkja um, at samveran, sum fellur saman við ætlaðu frítíðini, dettur burtur.

Við hesum uppskotinum verður tað sostatt gjørt greitt fyri foreldrunum, at ásett ella avtalað samvera skal haldast, og at brústaðarforeldrið skal leggja sína feriu við virðing fyri longu avtalaðari ella ásettari samveru.

***Ferðing og ferðaútreiðslur***

Ásett verður, at foreldrini hava felags ábyrgd av ferðing í sambandi við samveru. Hetta merkir, at myndugleikin á økinum sum meginregla ikki skal taka avgerð um ferðing. Einki verður nevnt um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru í sjálvari lógini.

Treytir um býtið av ábyrgdini av ferðingini kunnu í heilt serligum førum ásetast. Talan er um eitt sera snævurt undantak til at víkja frá meginregluni um, at foreldrini hava felags ábyrgd av ferðing í sambandi við samveru.

Talan kann t.d. vera um støður, har heilt serlig landafrøðilig ella onnur atlit til ferðing gera seg galdandi, og umstøðurnar í málinum annars tala fyri at víkja frá meginregluni. Tað skal soleiðis út frá eini heildarmeting av ymiskum viðurskiftum vera mett eyðsæð órímiligt, at annað av foreldrunum hevur ábyrgd av einum parti av ferðingini, áðrenn vikið kann verða frá meginregluni. Um tað í undantaksføri verður mett, at grundarlag er fyri at víkja frá meginregluni um felags ábyrgd, kann myndugleikin áseta, hvussu ferðingin skal skipast.

Í § 47, stk. 5 er heimilað landsstýrismanningum at áseta nærri reglur um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru.

Sum avleiðing av omanfyri standandi verður heimildin hjá landsstýrismanninum at áseta reglur um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru broytt til eina heimild at áseta reglur um ferðing í sambandi við samveru.

***Heimild at taka avgerð um bústaðin hjá barninum***

Sambært gomlu foreldramyndugleikalógini var eingin heimild at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Spurningurin um bústaðin hjá barninum var ein partur av foreldramyndugleikamálinum, og ósemjur um hetta vóru viðgjørdar og avgjørdar í rættinum.

Sambært nýggju lógini ber til at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Tað er Familjufyrisitingin sum hevur fingið hesa heimild. Í lógini er tó ásett, at rætturin kann taka fyribils avgerð um bústaðin hjá barninum.

Hóast hetta er ásett í lógini, ber hetta í løtuni ikki til, tí eingin heimild er til tað í rættargangslógin. Hetta verður tí rættað.

***Ókeypis advokatumboðan***

Rætturin til ókeypis advokatumboðan verður avmarkaður til sum meginregla bara at fevna um mál um bústaðin hjá barninum.

Hava foreldur felags foreldramyndugleika, og eru tey ósamd um hjá hvørjum teirra, barnið skal búgva, kann Familjufyrisitingin taka avgerð um tað. Talan er um eina somikið inntrívandi avgerð, og tí verður rætturin til ókeypis umboðan í hesum málum varðveittur. Hetta er fyri at taka atlit at rættartrygdini í fyrisitingarligum avgerðum og at tryggja, at foreldur eru javnsett í síni umboðan í Familjufyrisitingini.

Samverumál eru av slíkum slagi, at tey ofta eru áhaldandi við fleiri umsóknum um at økja, minka ella steðga samveru. Hóast ein samveruskipan verður avtalað á einum innleiðandi fundi, er ikki vist, at málið endar fyribils, av tí at ein slík samveruskipan kann verða avtalað sum ein royndartíð við upp til trimum uppfylgjandi fundum. Eisini eru mál, har Familjufyrisitingin ikki ásetir feriusamveru í fyrstu atløgu, og mál, har samveruforeldur søkir um feriusamveru frá ferð til ferð, tí bústaðar- ella arbeiðsumstøður eru soleiðis háttaðar.

Talan er sostatt um drúgv og tíðarkrevjandi mál, og av tí at hædd upprunaliga ikki er tikin fyri fíggjarligu avleiðingunum, er eingin játtan til endamálið.

Endamálið hjá Familjufyrisitingini er at hjálpa foreldrunum at finna semju um eina samveruskipan. Foreldur fáa bjóðað at royna barnaserkøna ráðgeving ella mekling, eins og sjónarmiðini hjá barninum verður væl lýst, áðrenn avgerð verður tikið.

Rætturin til ókeypis umboðan fer tó eisini at fevna um samverumálum, um samverumálið verður viðgjørt saman við málinum um bústaðin hjá barninum, sbr. § 38, stk. 2.

Í galdandi lóg er ásett, at partarnar hava rætt til ókeypis umboðan í málum til viðgerðar í Familjufyrisitingini.

Avgerðir hjá Familjufyrisitingini kunnu kærast til Føroya Kærustovn, og rætturin til ókeypis advokatumboðan verður eisini galdandi fyri kærumálsviðgerðina.

Verður málið lagt fyri rættin, eru reglurnar um fría rættarførslu sambært rættargangslógini galdandi.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð lagt á heimasíðuna hjá Løgmálaráðnum til almenna hoyring.

Uppskotið er sent til ummælis hjá:

- Familjufyrisitingini
- Dátueftirlitinum
- Advokatfelag Føroya
- Javnstøðunevndini

- Barnabata
- MEA – húsið fyri familjumenning
- Føroya Kærustovni
- Føroya rætti
- Almannaverkinum
- Barnaverndarstovuni
- Pedagogfelag Føroya
- Føroya Lærarafelag
- Gigni
- Felagið føroyskir sálarfrøðingar
- Stjórnarráðunum

Tá ið hoyringsfreistin var úti, vóru viðmerkingar komnar frá

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Foreldur, ið eru partar í málum um bústaðin hjá barninum, hava rætt til ókeypis umboðan í Familjufyrisitingini. Landskassin ber útreiðslurnar til advokatin, og Familjufyrisitingin umsitur játtanina.

Rætturin til ókeypis advokatumboðan verður avmarkaður til sum meginregla bara at fevna um mál um bústaðin hjá barninum. Rætturin til ókeypis advokatumboðan fevnir bara um samverumál, um samverumálið verður viðgjørt saman við málinum um bústaðin hjá barninum, sbr. § 38, stk. 2.

Hædd varð upprunaliga ikki tikin fyri fíggjarligu avleiðingunum av ókeypis advokatumboðan í samverumálum, og tí var heldur eingin játtan til hendan partin.

Tá ið løgtingslóg nr. 87 frá 16. mai 2022 um foreldramyndugleika og samveru varð skrivað, varð mett, at uml. 12 mál um bústaðin hjá barninum fara at verða viðgjørd í Familjufyrisitingini árliga, og at hetta svarar til 320 tús. kr.

Hetta verður væntandi óbroytt, og tí verður mett, at játtan longu er til endamálið.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar við sær fyri Familjufyrisitingina, av tí at Familjufyrisitingin skal taka avgerð um, um longu ásett ella avtalað samvera skal detta burtur ella ikki.

Soleiðis sum lógin nú er orðað, verður lagt upp til, at foreldur venda sær til Familjufyrisitingina fyri at fáa eina avgerð um ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru.

Hetta er óheppið og elvir til nógva og óneyðuga málsviðgerð.

Sambært uppskotinum hava foreldrini felags ábyrgd av ferðing í sambandi við samveru. Hetta merkir, at Familjufyrisitingin sum meginregla ikki skal taka avgerð um ferðing.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Við hesum uppskotinum verður rætturin hjá bústaðarforeldrinum til frítt at leggja sína feriu saman við barninum avmarkaður. Bústaðarforeldrið skal leggja sína feriu við virðing fyri longu avtalaðari ella ásettari samveru, og um frítíðin fellur saman við longu avtalaðari ella ásettari samveru, má bústaðarforeldrið søkja um, at samveran dettur burtur.

Endamálið við uppskotinum er m.a. at forða fyri sonevndari samverusjikanu. Hetta verður gjørt við at Familjufyrisitingina fær heimild at taka avgerð um, at avtalað ella ásett samvera dettur burtur.

Sambært galdandi lóg kunnu foreldur venda sær til Familjufyrisitingina fyri at fáa eina avgerð um ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Við uppskotinum verður hetta lagt út til foreldrini sjálvi at semjast um.

Rætturin til ókeypis advokatumboðan verður avmarkaður til sum meginregla bara at fevna um mál um bústaðin hjá barninum. Rætturin til ókeypis advokatumboðan fer tó eisini at fevna um samverumálum, um samverumálið verður viðgjørt saman við málinum um bústaðin hjá barninum, sbr. § 38, stk. 2.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er ikki í ansøgn við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan (EMRS) ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki nýggjar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Familjufyrisitingin fær heimild til at taka avgerð um, at avtalað ella ásett samvera dettur burtur. Heimildin er ætlað í førum, har bústaðarforeldrið skal halda feriu saman við barninum og frítíðin fellur samstundis sum longu ásett ella avtala samvera.

Familjufyrisitingin fær heimild til bara í serligum førum og eftir umbøn at áseta treytir viðvíkjandi ferðing í sambandi við samveru.

Heimildin hjá landsstýrismanninum til at áseta reglur um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru verður broytt til eina heimild at áseta reglur um ferðing í sambandi við samveru.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ongar aðrar avleiðingar við sær enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Nr. 1**
Í galdandi § 21 er ásett, at Familjufyrisitingin eftir umbøn kann taka avgerð um vavið og útinnan av samveru og kann áseta neyðugar treytir í hesum sambandi. Víðari er ásett, at Familjufyrisiting kann nokta at áseta samveru ella seta eina avtalu ella avgerð um samveru úr gildi.

Áseting verður strikað og samanskrivað við § 20. Hetta verður gjørt fyri at skapa ein betri samanhang í lógini.

Familjufyrisitingin kann sambært galdandi lóg áseta treytir í sambandi við samveru. Hetta verður óbroytt, tó soleiðis, at tað í stk. 3 verður skoytt uppí, at hesar treytirnar millum annað kunnu fevna um at varðveita passið hjá barninum og at tryggja, at samveruforeldrið ikki er ávirkað, meðan samvera er.

Talan er um longu galdandi praksis, sum nú verður ásett beinleiðis í lógini.

Treytir í sambandi við varðveitslu av passi eru treytaðar av, at talan er um ein grundaðan vanda fyri, at samveruforeldrið fer at taka barnið av landinum. Eru treytir um varðveitslu av passi ásettar, skal passið latast Familjufyrisitingini, áðrenn barnið verður latið til samveru.

Víst verður til dómspraksis TFA 2021.337 Ø um varðveitslu av passi.

Somuleiðis skal talan vera um ein grundaðan vanda fyri, at samveruforeldrið er ávirkað, meðan barnið hevur samveru við samveruforeldrið, áðrenn treytir kunnu ásetast í hesum sambandi. Treytirnar kunnu t.d. innibera, at samveruforeldrið skal lata eina landroynd.

**Nr. 2.**
Skotið verður upp, at ásett ella avtalað samvera bara dettur burtur, tá ið foreldrini hava avtalað tað, ella tá ið Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um tað.

Við hesum verður sligið fast, at avtalað ella ásett samvera sum meginregla ikki dettur burtur, og at brústaðarforeldrið skal leggja sína feriu við virðing fyri longu avtalaðari ella ásettari samveru. Endamálið við ásetingini er at forða fyri sonevndari samverusjikanu.

Reglur um viðbótarsamveru eru ásettar í § 24.

Samveruforeldrið hevur bara rætt til viðbótarsamveru í sambandi við støðuga samveru og ikki í einstøkum samveruavtalum, so sum samveru í feriu og halgidøgum ella samveru undir eftirliti.

Hetta merkir, at samveruforeldrið ikki fær viðbótarsamveru, um t.d. feriusamvera ikki verður hildin. Um barnið ikki verður handað til t.d. feriusamveru, má samveruforeldrið sostatt venda sær til fútarættin fyri at fáa samveru. . Hetta tí, at samvera er lagað til serligar umstøður, og tí

at tað illa ber til at seta samveru í staðin fyri feriusamveru á sama hátt sum við leypandi samveru.

Tað sama er galdandi fyri samveru undir eftirliti og samveru, sum liggur ávís tíðarskeið uttan fyri vanligu og leypandi samveruna, t.d. orsakað av skeivum arbeiðstíðum hjá samveruforeldrinum. Heldur ikki í hesum førum ber til at áseta samveru í staðin fyri samveruna, sum ikki var hildin eins og um talan var um leypandi samveru.

Tað kunnu sostatt vera fleiri støður, sum forða fyri, at barnið hevur samveru við samveruforeldrið. Bústaðarforeldrið kann t.d. leggja sína feriu saman við barninum soleiðis til rættis, at hetta gongur út yvir feriusamveru, sum annars longu er avtalað ella ásett.

Hetta er at meta sum samverusjikana og reglurnar um viðbótarsamveru fevna ikki um støður við samverusjikanu

Ásetingin í uppskoti ber í sær, at um bústaðarforeldrið vil leggja feriu saman við barninum á ein slíkan hátt, at tað gongur út fyri samveruna hjá barninum við samveruforeldrið, og foreldrini ikki kunnu semjast um hetta, skal bústaðarforeldrið søka um, at samveran, sum fellur saman við ætlaðu feriuni, dettur burtur.

Umsókn frá bústaðarforeldrinum um at samvera skal detta burtur verður latin Familjufyrisitingini, og Familjufyrisitingin tekur avgerð sambært § 20, sum heimilar Familjufyrisitingini at broyta ásetta ella avtalaða samveru. Ein umsókn um at samvera dettur burtur kann verða avvíst sambært § 44.

Atlitið at, at tað er best fyri barnið, at samveran fylgir føstu skipanini, tá ið foreldrini ikki kunnu samstarva um samveruna, eigur at viga tungt í metingin av, um samvera kann detta burtur, eins og tað skal takast við í metingini, um frítíðin verður løgd samstundis sum samveran sum sjikana.

Tað kunnu tó verða støður, har ynskið um at samvera dettur burtur orskað av feriu er vælgrundað, t.d. um ein serligur møguleiki hjá bústaðarforeldrinum kemur til at halda feriu saman við barninum orsakað av uttanfyristandandi umstøðum, sum bústaðarforeldrið ikki hevur ávirkan á.

Víst verður í hesum sambandi til pkt. 5.5.2. í Vejledning 2020-12-20 nr. 10064 om forældremyndighed, barnets bopæl og samvær.

Ein avgerð um samveru skal altíð takast við atliti at barnsins besta.

**Nr. 3**
Er eitt barn ættleitt, kann Familjufyrisitingin áseta samveru ella annað samband við uppruna skyldfólk. Hetta er ásett í § 23.

Við stk. 2 verður upprunaliga ætlanin og tað, sum er skrivað í viðmerkingunum til upprunaligu ásetingina, ásett beinleiðis í lógini, soleiðis at samvera er treytað av, at barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við viðkomandi, sum søkir um at fáa samveru ásetta.

Ein avgerð um samveru skal altíð takast við atliti at barnsins besta. Í metingini av barnsins besta er neyðugt við eini heildarmeting av stutttíðar og langtíðar støðuni hjá barninum. Tað er rætturin hjá barninum til samveru, sum er avgerandi sambært ásetingini, og ikki rætturin hjá uppruna skyldfólkunum.

Í metingini av barnsins besta skal atlit takast at serligu støðuni hjá barninum eftir eina ættleiðing, har samband skal knýtast millum barnið og ættleiðingarfamiljuna, og har barnið hevur tørv á einum støðugum og samanhangandi gerandisdegi. Orsakirnar til, at avgerð er tikin um ættleiðing uttan samtykki, t.d. manglandi foreldraførleiki,er eisini partur av metingini

Víst verður til løgtingsmál 102/2021 og til viðmerkingarnar til § 23 í upprunauppskotinum,.

**Nr. 4**
Yvirskriftin yvir § 29 verður broytt frá "Ferðing og ferðaútreiðslur" til "Ferðing í sambandi við samveru".

Hetta verður gjørt sum ein avleiðing av, at tað í § 1, nr. 5 í uppskotinum verður ásett, at foreldrini hava felags ábyrgd av ferðingini í sambandi við samveru. Meginreglan verður, at Familjufyrisitingin ikki skal taka avgerðir um smálutir í sambandi við samveru. Tað verður bara í heilt serligum førum, at Familjufyrisitingin kann taka áseta treytir um ferðin í sambandi við samveru. Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 5.

**Nr. 5**
Ásett verður, at foreldrini hava felags ábyrgd av ferðing í sambandi við samveru. Av tí at tað verður beinleiðis ásett í lógini, at hetta er ábyrgdin hjá foreldrunum, inniber tað, at Familjufyrisitingin sum meginregla ikki skal taka avgerð um hetta.

Foreldrini avgera sjálvi, hvussu tey deilast um ábyrgdina av ferðingini. Tey kunnu t.d. avtala, at samveruforeldrið heintar barnið, tá ið samveran byrjar, og at bústaðarforeldrið heintar barnið, tá ið samveran endar. Foreldrini kunnu avtala ta skipan, sum hóskar best til barnið og teirra umstøður annars. Foreldrini hava sjálvi ábyrgd av at leggja ferðingina til rættis, og Familjufyrisitingin skal sum meginregla ikki dragast inn í málið.

*Stk. 2.* Ásett verður, at Familjufyrisitingin í heilt serligum førum og eftir umbøn kann áseta treytir um ferðing í sambandi við samveru.

Talan er um eitt snævurt undantak frá møguleikin fyri at víkja frá meginregluni um, at foreldrini hava felags ábyrgd av ferðin í sambandi við samveru. Tað er tí bara í heilt serligum førum, at Familjufyrisitingin kann taka avgerð um og áseta treytir um býtið av felags ábyrgdini millum foreldrini av ferðingini.

Ein slík avgerð skal takast út frá einari ítøkiligari meting. Talan kann t.d. vera um støður, har heilt serlig landafrøðilig ella onnur atlit til ferðing gera seg galdandi, og umstøðurnar í málinum annars tala fyri at víkja frá meginregluni um, at foreldrini hava felags ábyrgd av ferðingini. Tað kann soleiðis út frá eini heildarmeting av ymiskum viðurskiftum vera mett eyðsæð órímiligt, at annað av foreldrunum skal halda ein part av ferðingini, áðrenn vikið kann verða frá meginregluni. Um Familjufyrisitingin metir, at grundarlag er fyri at víkja frá meginregluni um felags ábyrgd, skal Familjufyrisitingin áseta, hvussu ferðingin skal skipast.

Í hesum sambandi kann Familjufyrisitingin eisini í heilt serligum førum taka avgerð um, hvussu ferðaútreiðslurnar í sambandi við ferðingina skulu býtast millum foreldrini.

**Nr. 6**
Sambært gomlu foreldramyndugleikalógini var eingin heimild at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Spurningurin um bústaðin hjá barninum var ein partur av foreldramyndugleikamálinum, og ósemjur um hetta vóru viðgjørdar og avgjørdar í rættinum.

Sambært nýggju lógini ber til at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Tað er Familjufyrisitingin sum hevur fingið hesa heimild. Í lógini er tó ásett, at rætturin kann taka fyribils avgerð um bústaðin hjá barninum.

Hóast hetta er ásett í lógini, ber hetta í løtuni ikki til, tí eingin heimild er til tað í rættargangslógin.

Við hesum uppskotinum verður hetta rættað, og heimildin hjá rættinum at taka fyribils avgerðir um bústaðin hjá barninum verður strikað.

**Nr. 7**
Skotið verður upp, at nýggj yvirskrift verður sett yvir § 39, sum er soljóðandi: “Sjónarmiðini hjá barninum”.

Sambært § 39 skal barnið takast við í viðgerðini av einum máli um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru ella annað samband, soleiðis at sjónarmiðini hjá barninum koma til sjóndar.

Yvirskriftin verður sett inn fyri at skapa betri yvirlit í lógini.

**Nr. 8**
Skotið verður upp, at nýggj yvirskrift verður sett yvir § 43, sum er soljóðandi: “Fíggjarligar upplýsingar”.

Sambært § 43 kann Familjufyrisitingin í sambandi við viðgerð av málum sbrt. § 29 fáa til vegar upplýsingar um fíggjarstøðu hjá foreldrunum og upplýsingar annars, sum eru neyðugar fyri viðgerðina av málinum.

Yvirskriftin verður sett inn fyri at skapa betri yvirliti í lógini.

**Nr. 9**
Skotið verður upp, at nýggj yvirskrift verður sett yvir § 44, sum er soljóðandi: “Broyting og avvísan av umbøn um broyting”.

Sambært § 44, stk. 1 kann Familjufyrisitingin eftir umbøn broyta avgerðir um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, um samveru og um annað samband.

Sambært § 44, stk. 2 kann ein umbøn sbrt. stk. 1 verða avvíst, um viðurskiftini ikki eru broytt munandi.

Yvirskriftin verður sett inn fyri at skapa betri yvirliti í lógini.

**Nr. 10**

Sambært § 45 hava foreldur, sum eru partur í málinum um bústaðin hjá barninum og um samveru rætt til ókeypis umboðan í málum til viðgerðar í Familjufyrisitingini.

Við uppskotinum verður rætturin til ókeypis advokatumboðan avmarkaður til bara at fevna um mál um bústaðin hjá barninum og sum meginregla ikki um samverumál, sbrt. tó § 45, stk. 2 í uppskotinum. Víst verður í hesum sambandi við viðmerkingarnar til nr. 11.

Hava foreldur felags foreldramyndugleika, og eru tey ósamd um hjá hvørjum teirra, barnið skal búgva, kann Familjufyrisitingin taka avgerð um tað. Talan er um eina somikið inntrívandi avgerð, og tí verður rætturin til ókeypis umboðan í hesum málum varðveittur. Hetta er fyri at taka atlit at rættartrygdini í fyrisitingarligum avgerðum og at tryggja, at foreldur eru javnsett í síni umboðan í Familjufyrisitingini.

Samverumál eru av slíkum slagi, at tey ofta eru áhaldandi við fleiri umsóknum um at økja, minka ella steðga samveru. Hóast ein samveruskipan verður avtalað á einum innleiðandi fundi, er ikki vist, at málið endar fyribils, av tí at ein slík samveruskipan kann verða avtalað sum ein royndartíð við upp til trimum uppfylgjandi fundum. Eisini eru mál, har Familjufyrisitingin ikki ásetir feriusamveru í fyrstu atløgu, og mál, har samveruforeldur søkir um feriusamveru frá ferð til ferð, tí bústaðar- ella arbeiðsumstøður eru soleiðis háttaðar.

Talan er sostatt um drúgv og tíðarkrevjandi mál, og av tí at hædd ikki er tikin fyri fíggjarligu avleiðingunum, er eingin játtan til endamálið.

Endamálið hjá Familjufyrisitingini er at hjálpa foreldrunum at finna semju um eina samveruskipan. Foreldur fáa bjóðað at royna barnaserkøna ráðgeving ella mekling, eins og sjónarmiðini hjá barninum verður væl lýst, áðrenn avgerð verður tikið.

Í galdandi lóg er ásett, at partarnar hava rætt til ókeypis umboðan í málum til viðgerðar í Familjufyrisitingini.

Hetta verður broytt soleiðis, at rætturin til ókeypis advokatumboðan ikki er avmarkaður til viðgerðina í Familjufyrisitingini.

Í lógini er ásett, at avgerðir hjá Familjufyrisitingini kunnu kærast til Føroya Kærustovn, og rætturin til ókeypis advokatumboðan verður samsvarandi hesum eisini galdandi fyri kærumálsviðgerðina.

Verður málið lagt fyri rættin, eru reglurnar um fría rættarførslu sambært rættargangslógini galdandi.

**Nr. 11**

Í § 38, stk. 2 er ásett, at um somu partar hava fleiri ymisk mál um ymisk viðurskifti til viðgerðar samstundis, kann Familjufyrisitingin viðgera hesi undir einum.

Hetta er fyri at at lætta um og stytta um viðgerðartíðina, borgarunum at frama.

Samsvarandi hesum verður skotið upp, at rætturin til ókeypis advokatumboðan eisini er galdandi í samverumálum, treytað av at samverumálið verður viðgjørt saman við málinum um

bústaðin hjá barninum, sbr. § 38, stk. 2, og at partarnir hava fingið játtan um ókeypis advokatumboðan.

**Nr. 12**
Við hesi áseting verður kunngerðarheimildin at áseta nærri reglur um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru broytt til eina heimild at áseta nærri reglur um ferðing í sambandi við samveru.

Hetta verður gjørt sum ein avleiðing av, at § 29 verður broytt soleiðis, at Familjufyrisitingin sum meginregla ikki longur skal taka avgerð um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Tí er ikki longur neyðugt við slíkari heimild.

Í § 29, stk. 2 verður nú ásett, at Familjufyrisitingin í heilt serligum førum og eftir umbøn kann áseta treytir um býtið av ábyrgdini av ferðingini í sambandi við samveru.

Við hesi áseting fær landsstýrismaðurin í staðin heimild at áseta nærri reglur um, hvussu mál um ferðing í sambandi við samveru skulu viðgerast.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

Løgmálaráðið, 7. juli 20223.

**Bjarni Kárason Petersen**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur